# Teir eru favorittar

**Ein tann royndasti leikarin á mansliðnum hjá Mjølnir er Trygvi H. Poulsen. Hann sigur, at tað eru sørvingar, sum eru favorittar í mansfinaluni í dag**

STEYPAFINALA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Sigursvanda mansliðið í flogbólti hjá klaksvíkingum noyðist í steypafinaluni í ár at taka til takkar við at verða tað, sum á altjóða málið verður rópt "the underdogs". Tað vil siga, at mótstøðuliðið er favorittur, men tað hava teir einki ímóti.

### Vit skulu raka dagin

Trygvi Poulsen hevur verið við í nógv ár, og hann ásannar, at um Mjølnir skal gera sær nakrar vónir um at vinna steypafinaluna, so er neyðugt, at teir spæla væl betur, enn teir hava gjørt í seinastuni.

– Vit hava als ikki spælt nóg væl seinastu umførini, og tað er kanska ein trupulleiki hjá okkum, at tað hvílir ov nógv á teimum bestu spælarunum. Skulu vit vinna finaluna, so krevur tað ein góðan liðinnsats frá øllum spælarunum, og so noyðast vit sum lið eisini at raka dagin, sigur Trygvi.

Trygvi ásannar, at tað verður ein trupul uppgáva at basa sørvingum, tí teir eru sera væl fyri í løtuni. Hann heldur eitt nú, at leikandi venjarin hjá sørvingum, Rajko Petrovic, ongantíð hevur havt eitt so gott kappingarár sum í ár, og tað er ein avgjørdur styrkur hjá SÍ í ár.

– Teir eru sera sterkir í ár, og tað er eingin ivi um, at teir mugu metast sum favorittar, tí teir hava verið nógv tað mest støðuga liðið í ár, sigur Trygvi Poulsen.

### Steypakappingin kann bjarga árinum

Alt bendir nú á, at SÍ fer at gerast føroyameistari, og Trygvi Poulsen viðgongur eisini, at teir í Mjølnir hava avskrivað at verja meistaraheitið.

– Meistaraheitið er farið, og tí er tað umráðandi hjá okkum at vinna finaluna, tí tað kann bjarga okkum árinum, sigur hann.

Allir mans eru tøkir hjá Mjølnir til finaluna, og hóast onkur hevur havt onkran smærri snudd at dragast við, so er tað ikki nakað, ið forðar fyri luttøku í finaluni, greiðir Trygvi H. Poulsen frá.

– Sjálvur vænti eg eina javna og væl spælda finalu, og vit gleða okkum at spæla í teimum karmum, sum eru til steypafinalurnar í flogbólti, sigur Trygvi.

At tað verða nógvir klaksvíkingar á áskoðaraplássunum til finalurnar, er Trygvi ikki í iva um. Mjølnir er umboðað í bæði kvinnu- og mansfinaluni, og klaksvíkingar eru kendir fyri at stuðla sínum ítróttarfólki dyggiliga kring alt landið.

– Tað verður spennandi, og tað hevði verið hugaligt, um vit kundu farið norður til Klaksvíkar aftur við báðum steypunum, sigur Trygvi H. Poulsen at enda.



*Seinastu tíðina hevur SÍ havt betra takið, men alt bendir kortini á eina spennandi uppgerð, tá Mjølnir og SÍ hittast*

# Hálv triðja millión í kassan

**Hóast úrslitið í fjør bara var ein fjórðing av tí, sum tað var í 2003, so fløddi tað í kassanum hjá Fótbóltssambandinum**

FSF AÐALFUNDUR
*Jóannes Hansen*

Tað gongur rætta vegin í tí fíggjarliga hjá Fótbóltssambandinum, men talan er ikki um tann ógvusliga vøksturin, sum gjørdi seg galdandi í 2003. Sambært roknskapinum, sum nevndin hevur sent feløgunum undan aðalfundinum í dag, so fløddu í fjør 2,5 milliónir netto í kassan. Sammett við 2003 er talan ikki um serliga gott úrslit. Tá var yvirskotið 10,3 milliónir. At árini eru ymisk kemst av, at útreiðslurnar í sambandi við altjóða virksemið eru ymiskar frá ári og til ár, og at inntøkurnar í sama sambandi eisini eru ymiskar. Men harafturat er tað ein veruleiki, at fyrisitingarkostnaðurin er hækkaður við tveimum milliónum krónum.

Í fjør vóru samlaðu inntøkurnar hjá Fótbóltssambandinum 17,5 milliónir, og samlaðu útreiðslurnar vóru 15 milliónir krónur.

Eginpeningurin hjá FSF er 18,4 milliónir. Størsti parturin av hesum er FSF bygningurin, sum sambært roknskapinum umboðar 13,6 milliónir krónur. Á bók eigur FSF 2,85 milliónir, og skuldararnir telja 3,5 milliónir. Tað eru ivaleyst pengar, sum FSF eigur til góða hjá altjóða felagsskapunum.

Samlaða skuldin hjá FSF er 2,99 milliónir krónur. Ætlanin er, at FSF onga skuld skal hava um fimm ár. Í 2005 fella 645 túsund til gjaldingar. Mest sum øll FSF skuldin er til Sportfive, sum hevur keypt sjónvarpsrættindini frá FSF, og til UEFA.

### Altjóða virksemið gav og tók

Tað hevur so ofta verið sagt, og roknskapurin staðfestir henda veruleikan. Tað eru inntøkurnar frá altjóða virkseminum, sum telja nógv mest. Samlaða inntøkan var 17,5 milliónir krónur. Fyri sendirættindi fekk FSF í fjør 5,1 millión frá Sportfive. Luturin frá UEFA var 5,5 milliónir og frá FIFA 1,6 millión krónur. Fyri atgongumerkir fingust 2,0 milliónir. Landskassastuðulin var 980 túsund, og luttøkugjøld v.m. 550 túsund krónur.

Samlaðu útreiðslurnar vóru 15 milliónir krónur. Størsta einstaka útreiðslan var til a- landsliðið. Kostnaðurin av tí var 5,4 milliónir krónur. U-19 landsliðið kostaði eina millión í fjør. Tað er fýra ferðir so nógv, sum tað kostaði í 2003. Hini landsliðini kostaðu tilsaman 1,5 millión, og virksemið hjá nevndunum kostaði íalt 1,5 milliónir krónur.

Útreiðslurnar til starvsfólk í FSF, íroknað venjarar og gjald til spælararnar, og fyrisitingarútreiðslurnar annars vóru tilsaman 9,6 milliónir krónur. Hetta er meiri enn tvær milliónir meiri enn í 2003. Umframt sáttmálaásettu lønarhækkingarnar, so økti FSF í fjør um umsitingina. Tað varð gjørt, tí arbeiðsbyrðan — ikki minst orsaka av altjóað virkseminum og minstukrøvunum frá FIFA — var vorðin so stór.

# Vit verða ringir at taka

**Liðskiparin hjá SÍ, Jón Nielsen, heldur, at liðið hjá sørvingum er so mikið væl fyri í ár, at teir verða ringir hjá klaksvíkingum at taka í finaluni.**

STEYPAFINALA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Sørvingar hava gott sjálvsálit undan steypafinaluni hjá monnum í flogbólti í dag. Sørvingar eru greitt á odda í landskappingini, og alt bendir á, at teir fyri fyrstu ferð í søgu felagsins gerast føroyameistarar í mansflogbólti. Gongur tað sum liðskiparin hjá SÍ, Jón Nielsen, ætlar, so gerast sørvingar greipuvinnarar í ár, nú felagið fyllir 100 ár, og fyrsta stigið til at røkka tí málinum er at gerast steypavinnari í dag.

### Koyrir væl í løtuni

– Vit eru ómetaliga væl fyri í ár, og tað koyrir ótrúliga væl hjá okkum í løtuni, sigur Jón Nielsen. Sjálvur hevur Jón verið á besta liðnum hjá SÍ í nógv ár, og hann er ikki í iva um, at liðið, sum sørvingar hava í ár, er tað besta liðið, ið teir nakrantíð hava havt.

– Vit hava góða rutinu, góða breidd, og sjálvsálitið hjá okkum hevur ongantíð verið so gott sum nú. Skulu vit gerast steypavinnarar, so er árið í ár tað rætta, tí vit hava ongantíð verið betur fyri, sigur Jón Nielsen.

Fólk flest siga, at sørvingar eru greiðir favorittar undan finaluni, og tann leiklut hevur Jón einki ímóti at hava. — Tað verður ofta sagt, at tað er so keðiligt at verða favorittur, men vit átaka okkum fegnir tann leiklut. Eg haldi eisini, at vit í ár hava mentalu yvirvágina á klaksvíkingum, tí vit hava vunnið allar dystirnar ímóti teimum í hesum kappingarárinum, sigur liðskiparin hjá SÍ.

Spurdur hvat skal til, um SÍ skal vinna dystin, sigur Jón Nielsen: – Skulu vit vinna, so er tað neyðugt, at vit sleppa at spæla okkara spæl. Tað vil siga, at vit spæla í høgum tempo, hægri enn hvat hini liðini eru von við at spæla, tí so klárar Mjølnir ikki at fylgja við, sigur hann.

### Fleiri bussar úr Sørvági

Leikararnir hjá SÍ hava ikki gjørt nakað serligt burtur úr fyrireikingunum til dystin í dag, og venjingin hevur verið sum vanligt. Men fólkini uttan fyri vøllin fara at gera nógv burtur úr í dag. Byrjað verður við, at tað verður morgunmatarborð í SÍ-húsinum, har fólk eisini verða málað, greiðir Jón frá. Nakað undan sjálvari finaluni fara tríggir fullir bussar av fólki til Havnar, so tað er lítið at ivast í, at sørvingar verða dyggiliga stuðlaðir av sínum bygdarmonnum í finaluni.

Jón Nielsen sigur, at árið í ár hevur verið serstakliga hugaligt, og at hugurin hjá monnum bæði at spæla og venja hevur ongantíð áður verið so góður.

Um SÍ í dag gerst steypavinnari, so hava teir bert fyri neyðini at vinna tveir dystir í landskappingini, áðrenn teir kunnu rópa seg greipuvinnarar, og tað hevði óivað verið besta føðingardagsgávan, ið felagið kundi ynskt sær.